## Portalurin slær øll met

Ongan tíð áður hava so nógv fólk vitjað portalin, sum tey gjørdu í farnu viku. Bæði í tali av brúkarum, vitjanum og sýndum síðum varð talan um met. Og kanska er tað nakað um tað, tá sagt verður, at veðrið er tað, sum upptekur føroyingar mest. Leitast skal nevnliga aftur til illveðrið til Summarfestivalin fyri at síggja eitt líknandi tal av sýndu m síðum. Hesa ferð gjørdist talan tó um 3.192.726 sýndar síður, og tað er nýtt met. Portalurin er langt ovasta síðan á vevmátingarlistanum hjá Gallup. Næstu síðurnar eru uf.fo, planet.fo, nummar.fo og sportal.fo



## Ov nógv rækjuskip

Ein frágreiðing, sum eitt ráðgevandi felag hevur gjørt um rækjufiskiskapin á teimum innaru leiðunum í Grønlandi, kemur til ta niðurstøðu, at myndugleikarnir eiga at skerja skipatalið, so bara ein tíggjundapartur verður eftir. Men tað er púra burturvið og letur seg als ikki gera, sigur Finn Karlsen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum. Ráðgevandi felagið sigur, at skipini eru ov mong í tali og harafturat gomul, og so fellur prísurin á rækjum eisini.

# Mong eru ónøgd

**- Mín einasta niðurstøða má verða, at eg ikki havi havt undirtøku í tingmanninginí. Eg veit, eg var í uppskoti, men eingin semja er fingin um hvørki meg ella Olgu Biskopstø. Og tað er bara veruleikin, sigur Heidi Petersen**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Eg kenni onga grund. Men eg veit, at felagið her norðuri innstillaði meg til landsstýrissessin sum mentamálaráðharri. Meiri dugi eg ikki at siga, sigur Heidi Petersen, tá Sosialurin spyr, hvussu tað bar til, at hon ikki gjørdist mentamálaráðharri.

Tjóðveldiskvinnan úr Vestmanna vísir á, at hon var ikki við til tingingarnar um landsstýrissessirnar, tí tað er eitt mál, sum verður avgjørt í tingbólki og floksleiðslu.

- Eg veit tí einki annað enn, at eg kann ímynda mær, nóg stór undirtøka ikki var í tingbólkinum at velja hvørki meg ella Olgu Biskopstø. Men hetta er ein demokratiskur framferðarháttur, og tað ætli eg mær at góðtaka, sigur Heidi Petersen.

Hon sigur, at hon einki orð hevur hoyrt um, hví hon ikki fekk neyðugu undirtøkuna í flokkinum.

- Eg vil ikki siga, at eg eri beinleiðis vónbrotin. Hinvegin var eg spent upp á at vita, um luturin fall á meg, nú eg var í uppskoti. Tað er eingin loyna, at júst mentanarøkið er tað, sum eg havi fingist eina mest við seinastu fýra árini á tingi. Tí meti eg eisini, at eg havi neyðugu royndirnar til ein slíkan sess, sigur Heidi Petersen.

### Aftur um brekkur

Men hon hevur hvørki hoyrt orð ella eið frá hvørki floksformanni ella tingbólki, og sigur seg – eins og Heini O. Heinesen – ikki hava fingið lyfti um nakað sum helst sum plástur á sárið, nú hon ikki gjørdist mentamálaráðharri.

- Eg havi einki fingið at vita, men eg kenni spælireglurnar, og góðtaki tær eisini, sigur Heidi Petersen.

Tað undrar hana kortini, at telvingin hjá Tjóðveldi í síðsta enda førdi til, at flokkurin fór heilt út um politiska spektrið at finna mentamálaráðharran. Sum kunnugt fall valið á Kristinu Háfoss, ið hevur verið púrasta óvirkin í politikki seinastu fýra árini.

- Við hesum valinum hevur flokkurin megnað at miðsavna øll fýra landsstýrisfólkini í miðstaðnum. Gamaní er Tobbi av Glyvrum, men hann býr sum hin fjórði í Havn. Og tað er óheppi og eisini nakað, sum kann koma flokkinum aftur um brekku seinni, sigur Heidi Petersen.

### Ikki á latu síðuni

Men hvussu er og ikki, so hevur alt hetta ført við sær, at Heidi Petersen endurvinnur sítt sæti á tingi. Og tað er hon sera væl nøgd við.



*Eg vil ikki siga, at eg eri beinleiðis vónbrotin, men eg var kortini spent upp á at vita, um luturin fall til mín, nú eg var í uppskoti at gerast mentamálaráðharri, sigur Heidi Petersen*

- Mær hevur dámað ógvuliga væl at siti á tingi seinastu fýra árini, og eg gleði meg at taka hetta arbeiði upp aftur, sigur Heidi Petersen.

Og hóast nýggja samgongan má sigast at hava fingið eina rokasliga byrjan, hevur Tjóðveldiskvinnan úr Vestmanna góðar vónir um, at samstarvið fer at halda komandi fýra árini.

- Um fólk eru innstillað upp á at samstarva komandi fýra árini, og hava viljan at halda stevið, so vænti eg avgjørt, at vit megna at halda upp á samgonguna alt samgonguskeiðið, sigur Heidi Petersen, sum altso ikki gjørdist mentamálaráðharri, hóast hon var í uppskoti, og av eygleiðarum mett sum upplagda boðið.

# Størri byrðar á vinnuna

**Hóast Vinnuhúsið fegnast um nógv av tí, sum stendur í samgonguskjalinum, so er hinvegin nógv sum bendir á, at nýggja samgongan hevur góðan hug at leggja størri byrðar á vinnulívið**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Har eru bæði góð og minni góð ting í samgonguskjalinum, heldur Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum*

Vinnuhúsið sigur á heimasíðu síni, at tað tykist, sum nýggja samgongan hevur hug at leggja størri byrðar á vinnulívið, men samstundis stendur í samgonguskjalinum, at ætlanin er at leggja viðurskiftini soleiðis til rættis, at íverksetan skal stimbrast.

- Vit halda, at tað er ein ávísur mótsetningur í, at mann eggjar fólki til íverksetan, samstundis sum mann leggur størri byrðar á vinnuna, segði Marita Rasmussen við Rás2.

Hesar øktu byrðar, sum stjórin í Vinnuhúsinum siptar til, eru eitt nú betrað skipan í ALS, barsilstíðin skal leingjast, útbúgvingargrunnur stovnast, samhaldsfasti skal hækka, og gjald skal verða í sambandi við barnsins fyrsta sjúkradag.

- Hetta eru typiskt skipanir, sum vinnan er við til at fíggja, og skulu hesar broytast og betrast, so merkir tað alt annað líka, at størri útreiðslur verða lagdar á arbeiðsgevararnar, segði Marita Rasmussen.

Hinvegin heldur stjórin í Vinnuhúsinum, at alt kortini ikki er tann reina neyð og elendigheit í samgonguskjalinum. Har eru eisini ting, sum vinnan sær positivt upp á. Kanska serliga ætlanin um at loysa upp fyri útlendskari arbeiðsmegi.

- Skulu vit skapa búskaparliga menning er tað neyðugt, at vinnan fær neyðugu karmarnar at virka undir, eitt nú við at tørvurin á útlendskari arbeiðsmegi verður nøktaður, segði Marita Rasmussen.

### Tola ikki fleiri byrðar

Føroya Arbeiðsgevarafelag gongur út frá, at vinnan eins og vanligt er verður tikin við, tá talan er um at broyta og betra skipanirnar.

- Og har vilja vit so bara vóna, at hesar broytingarnar eisini fara at betra viðurskiftini fyri føroyska arbeiðsmarknaðin, og ikki bara fyri hvønn einstakan, segði Marita Rasmussen.

Hvør verður avleiðingin, um orðaði politikkurin verður førdur út í lívið?

- Tað verður neyðugt at hyggja at gongdini í vinnuni. Úrslitið í fiskivinnuni seinastu árini hava ikki givið ábendingar um, at tað gongur serliga væl. Tað er tí eingin ivi um, at leggur tú størri byrðar á tann partin av vinnuni, fer tað at ávirka teirra úrslit, segði Marita Rasmussen.

Hon vísti á, at vit eru í einari støðugari kapping við vinnur uttanlands.

- Tað, sum umrøður fyri okkum er, at treytirnar, vinnan virkar undir, ikki á nakran hátt ávirkar teirra møguleika at klára seg frameftir, segði Marita Rasmussen við Rás2.